


*Better Place støðirnar vera heilautomatiskar. Bilførarin koyrir inn á støðina og steðgar við skiftiautomatina, sum sjálv skiftir battaríið. Hetta tekur minni enn tríggjar minuttir*

# Battaríiskiftistøðir til elbilar



*Samstarvsætlanin millum Dong Energy og Better Place gongur m.a. út upp á at nýta orkuna frá vindmyllum til løðing av battaríum til elbilar. Her er ein Renault Laguna elbilur*

**Sambært orkufelagsskapunum Dong Energy og Better Place kunnu vit rokna við at bilarnir í framtíðini fara at koyra inn á servicestøðir at skifta battarí ístaðin fyri at fylla olju ella bensin á tangan**

Elbilar verða í framtíðini eitt veruligt alternativ til teir bilar, vit kenna í dag. Hetta kom fram í einum fyrilestri í Norðurlandahúsinum mánakvøldið 6. oktober 2008, sum elfelagið SEV og Sp/f Baldursbrá hjá Johann Mortensen skipaðu fyri. Tað var Jane Pedersen, frá orkufelagsskapinum Dong Energy í Danmark, sum greiddi frá um alternativa orku og elbilar.

Dong Energy arbeiðir saman við amerikanska felagnum Better Place um nógvar spennandi loysnir við alternativari elmegi, sum t.d. sólorku og vindorku.

Ein av framtíðarverkætlanunum gongur í stuttum út upp á at nýta orkuna frá vindmyllum.

Vindmyllurnar koyra alt samdøgrið og um náttina er streymnýtslan munandi minni enn um dagin.

Yvirskotið frá streymframleiðsluni um náttina fer til løðing av accumulatorum, sum kunnu nýtast til bilar soleiðis at elbilar í framtíðini kunnu koyra inn á servicestøðir at "bunkra" við at skifta tann tóma akkumulatorin út við ein fult uppløddan.

## Better Place servicestøðir

Better Place er ein amerikansk fyritøka, sum miðvíst arbeiðir fyri at minka um nýtsluna av olju kring allan heim. Hetta verður gjørt við at byrja við nýggjum alternativum infrastrukturi við t.d. elektriskum akførum.

Tað var Shai Agassi (f.1968), sum stovnaði Better Place í 2007 við høvuðssæti í California í USA.

Uttan fyri USA er Better Place í fyrstu atløgu byrjað við sínum verkætlanum í t.d. Ísrael og Danmark, har elektrisitet verður gjørt við sólorku og vindmegi.



*»No fuel pleace« stendur innan fyri í "bensindekslinum"*